# liga kreppan í ES loyst?




*vanligt, er det ikke de trætte mænd i jakkesæt, der er problemet. De gjorde hvad de kunne i en politisk struktur, der skriger på reformer."*

Niðurstøðan er sostatt, at tað er politiski struktururin, sum hann er í løtuni, sum er óhóskandi. Tað var millum annað hetta, at tann nýggja traktatin, sum nú er fallin, skuldi bøta um.

## CAP og bretska rabatt-skipanin

Franskmenn og Chirac elska sjálvandi ta landbúnaðarskipan, CAP, sum ES hevur haft í meir enn fjøruti ár, tí har eru nógvir pengar at heinta. Men skipanin hóskar illa saman við ta annars í høvuðsheitum liberalu ella sosial-liberalu grundhugsan, sum samtakið byggir á. Hon ger tað ma. møguligt at dyrka sukurrøtur í Danmark, hóast veðurlagið aðrastaðni er betur hóskandi til hesa framleiðslu. Skipanin er uppá mangar mátar konserverandi, hon tvíheldur um framleiðsluhættir, sum ikki longur eru kappingarførir uttan áhaldandi pengastuðul.

Bretar fingu sína rabattskipan tá konservativa Mrs Thatcher helt, at bretar betaltu ov nógv til henda felags politikk, CAP, og fingu ov lítið burturúr. Paradoksið er, at bretar nú sleppa bíliga, meðan nýggj og nógv fátækari lond betala fullan prís.

Tað er tí, at Blair sigur, at teir ikki vilja sleppa rabattskipanini, uttan so at foroldaða landbúnaðarskipanin verður broytt ella helst púra avtikin. Pengarnir kunnu brúkast fornuftigari enn til "økismenning", sum ikki fremur nakað nýtt.

## Hvar fara pengarnir, sum eru á ES-fíggjarlógini?

ES hevur eina fíggjarlóg, sum brúkar umleið 1% av framleiðsluni (GDP) í samtakinum. *Mynd 2* vísir, at nógv tann størsti posturin er henda konserverandi landbúnaðarskipan. Høvdu hesar næstan 50 milliardirnar td. farið til gransking, sum nú fær bert 5 milliardir, so hevði stuðulin peika frameftir. Og tað er neyðugt, í hesi globaliseringstíð.

*Mynd 3* vísir so, hvørji lond procentvíst fáa mest burturúr tilsamans. Klárt liggur Frankaríki á odda í hesum. Tað er júst her, ið stríðið stendur, um tað skal sigast einfalt.

## Tony Blair hugtók fólk í Europaparlamentinum

Í vikuni sum fór helt Tony Blair eina røðu í ES-parlamentinum. Hon var serliga áhugaverd, tí Bretland yvirtekur formannssessin í Europeiska Ráðnum nú fríggjadagin tann 1. juli.

Røðan var spennandi, tí Blair hevði frammanundan fingið skyldina fyri, at ES-fíggjarlógin ikki bleiv samtykt, tí bretar ikki vildu slaka í rabatt-málinum, sum nevnt er omanfyri.

Røðan var eisini spennandi, tí Tony Blair vísti í henni, at hann bæði hevði ta søguligu dimensiónina um bakgrundina fyri at sameina Europa og ikki drepa hvønn annan, og hann hevði eisini visiónir, sum undirritaði helt vera skilagóðar og sum peikaðu út um klandrið, sum er í løtuni.

Hann segði: *" This is a union of values, of solidarity between nations and people, of not just a common market in which we trade."* Ella: hetta er eitt samtak um virðir, um samhug millum tjóðir og fólk, ikki bert ein felags marknaður har vit keypa og selja. Hann víst eisini á, at USA í dag er einasta superveldið í heiminum.

Men Kina og India fara um fá tíggju-ár at verða heimsins størstu búskapir, hvørt av hesum londum hava eitt fólkatal, sum er tríggjar ferðir størri enn tað í ES. Tað er, sambært Blair, meiningsleyst at brúka pengar og orku uppá konserverandi tiltøk, og tí skal landbúnaðarpolitikkurin broytast frá grundini, og so skjótt sum til ber. Tað er vónleyst at arbeiða ímóti globaliseringini við at avbyrgja seg, ella at subventionera (stuðla) doyggjandi framleiðslugreinar.

Klárt segði hann eisini, at politiskir leiðarar, bæði í ES-sambandi og í limalondunum, hava ta uppgávu at framleggja visiónir og uppskot til loysnir og gongdar leiðir. Tað er ikki uppgávan hjá teimum at koma við trúarjáttanum og at endurtaka gamlar niðurstøður.

Røðan kundi givið vón um, at bretski formannsskapurin kundi fingi ES-tokið í gongd aftur. Men, sum nevnt fleiri ferðir, so er støðan trupul. Fleiri eygleiðarar hava víst á, at røðan var frálík, men nær fer Blair at halda eina slíka røðu heima í London? Hin tunga barlastin í ES av útslitnum politikarum má eisini sleppast. Men tað fer at taka nøkur ár áðrenn bæði Chirac, Schröder og Balkenende eru pensioneraðir, og nýggjar kreftir eru komnar frammat.

**Keldur:**
*ADVFN Forex: "Dollar troubled by widening US trade gap" 17.06.05*
*BBC.news: "Full text: Blair's European speech" (newsvote.bbc.co.uk/)*
*"The Economist" 25.06.05*
*"Politiken" Oddagreinir 20.06.05 og 25.06.05*

# Veiðiorkan økt undir fiskidagaskipanini

**- Verða allir skipabólkarnir tiknir undir einum, er veiðiorkan økt hesi árini, fiskidagaskipanin hevur verið í gildi, sigur trímannabólkurin, sum hugdi at fiskidagaskipanini**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í november í fjør heitti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, á Ólav A. Olsen (fyri Fiskidaganevndina), Petur Steingrund (fyri Fiskirannsóknarstovuna) og Kristin Rasmussen um at kanna fiskiorkuna á føroyska landgrunninum og Føroyabanka. Kristin varð valdur til formann fyri hesum arbeiði.

Orsøkin til áheitanina hjá landsstýrismanninum var, at stór ósemja er um, hvørt verandi fiskidagaskipan er sjálvregulerandi – ella, um fiskiorkan økist, sum árini ganga.

Fiskimálaráðharrin metti tað vera neyðugt, at ein bólkur setti seg niður at kanna hesi viðurskifti og koma við eini frágreiðing, sum lýsir støðuna.

Tann 5. apríl í ár kom so bólkurin við síni frágreiðing.

Í sínum samandrátti, sigur bólkurin, at vera allir skipabólkarnir tiknir undir einum, er veiðiorkan økt hesi árini, fiskidagaskipanin hevur verið í gildi.

- Vit hava í hesi kanning hugt at, hvussu gongdin hevur verið við nýtsluni av teimum tillutaðu fiskidøgunum hjá teimum ymisku skipabólkunum og kunnu vísa á, at partrolararnir brúka færri dagar nú, enn tá ið fiskidagaskipanin varð sett í verk. Línuskipini brúka fleiri dagar, bólkur 4A hevur minkað eitt vet um nýtsluna, ímeðan bólkur 4B hevur eina størri øking. Eisini bólkur 5 hevur økt nógv um brúkta dagatalið. Hetta hendir, hóast samlaða tillutaða fiskidagatalið er skert við knøppum 20 % síðan 1996.

Bólkurin vísir á, at keyp og søla av døgum er økt, serliga er ein stór øking hjá bólki 4A frá fiskiárinum 2002/2003 til 2003/2004.

- Verður hugt at teimum førum, sum eru til fiskiskap, sæst sum heild, at ein lítil vøkstur er í støddini á skipunum, sum eru í vinnu, maskinmátturin hevur tó hug til at standa í stað. Vit hava ikki havt møguleika til at kanna bólk 5. Her kann ein broyting vera farin fram, uttan at tað er skrásett.

Víst verður á, at tovtímar hjá partrolarum og tal av húkum hjá línuskipunum var longu komið upp á eitt høgt støði, áðrenn fiskidagaskipanin varð sett í verk, men øktist tó nakað fyrstu tvey árini undir fiskidagaskipanini. Síðani 1998 hevur royndin fyri hvønn dag verið umleið tann sama og hevur helst nátt loftið við verandi tøkni. Broytingar í veiðiorku eftir 1998 eru tí ikki vegna økta roynd fyri hvønn dag hjá línuskipum og partrolarum.

- Tað er tó sannlíkt, at útróðrarbátar (bólkur 4A og 4B) hava økt mundandi um roynd (húkar í sjónum) fyri hvønn dag, men vit hava ikki havt nøkur tøl at halda okkum til, siga teir tríggir, Ólavur A. Olsen, Petur Steingrund og Kristin Rasmussen í frágreiðingini.

